# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur hóskvøldið 20. juli**
***Norðoya Vistarheim:*** kl. 19.30, Elsa Funding

**6. sunnudag e. Trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00 Bjarni Bæk, altarg., skriftamál kl. 10.40. ***Talvan gongur fyri føroysku sjómansmissiónina.***
***Vestmanna:*** kl. 11.00, altarg., Inga Poulsen Dam
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11.00, Hanne Sander
***Oyndarfjørður:*** kl. 12.00, John Myllhamar
***Eiði:*** kl. 10.40 Skriftamál, kl. 11.00 Messa, Emil Olsen
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00, Niels Pauli Danielsen og Hanus Simonsen
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10.00,
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30, Elsa Funding
***á Húsum:*** kl. 11.00, altarg., Hans Eiler Hammer
***Vágur:*** kl. 11.00,
***Porkeri:*** kl. 12.00,
***Sumba:*** kl. 13.10, Patrick de Neergaard

***Sunnudagin 23. juli gongur talvan í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri Føroysku Sjómansmissiónina.***

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti.

**Samkoman v/ Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorginin kl. 10.30 breyðbróting.
Kl. 18.00 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta v/ Jóna Johannesen.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag, kl. 17.00 Tímabøn.
Í morgin kl. 6.00 Morgunbøn.
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn (einki ungdómsmøti vegna luttøku á G! Festivalkirkjuni)
Sunnudagin kl. 10.45 Morgungudstænasta.
Mánadagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11.00 Møti.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa v/ Benny Blumensaat, prestur í Mariukirkjuni.
www.katolsk.fo

**Hebron, Argir**
Leygardagin kl. 20.00 Ungdómsmøti saman við Lívdini og Ebenezer.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum talar Sverri Steintún.
www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v/ Petur Martin Glerfoss, Bjartur Johannesen syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Í summarhálvuni hava vit onki morgunmøti.
Kvøldmøti hvønn sunnudag kl. 18.00. Øll eru vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti, YWAM-team úr USA luttekur á báðum møtunum.
www.gospel.fo

**Saron, Vestmanna**
Mikudagin 19.7. Bønar- og útimøti í Vestmanna kl. 20.00.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti við Thorstein Johannesen, innsavnan til Heimamissiónina.

**Haldarsvík**
Heimamissiónin hevur útimøti leygardagin kl. 20.00.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti.

**Kedron, Sørvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti verður í kjallaranum.
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting við uppingingarmøti. Onki evangel. møti vegna summarfrí.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Sunnumorgun kl. 10.30 Møti (ung luttaka).
Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan í Skálafirði**
Sunnumorgun kl. 11.00 Møti v/ Bjartu Petersen.

**Karmel, Eiði**
Sunnukvøldið kl. 19.00 Møti við John Myllhamar, trúboðara. Innsavning.

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Mikudagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti við André Matras.
Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn og kl. 21.00 UngdómsRóp.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við sunnudagsskúla. André Matras talar. Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 Morgunmøti.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími við Petur Martin Glerfos, evni »náðigávur«.
Hóskvøldið kl. 19.00 Bønarløta.
Sunnudagsskúlin er í summarfrí.
Sunnudagin kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Hanus Lassen. Kl. 21.00 Ungdómsmøti. Øll vælkomin.
www.kuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20.00 Bíbliutími Kol. 3. kap.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti við luttøku úr Havn.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Eysturoyar gongufelag**
Gongutúrur verður út á Borðoyarnes sunnudagin 23. juli. Vit møtast við vatnbrunnarnar í Uppsølum kl. 14.00. Túrurin er miðal og tekur umleið 5 tímar.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Tilhaldið verður stongt:
3. juli–21. juli og
1. august–11. august.
24. juli–27. juli er opið frá kl. 10.00–17.00.
***Á Ólavsøku, 28., 29 og 30. juli er opið kl. 15.00–19.00.***
Í miðhæddini: Framsýning av bókjaraamboðum.
Í kjallaranum: Søla av rabarbudessert og drekkamunni.
***Skeið fyri menn verður í horn- og træhandverki í Tilhaldinum 11.-15. sept. kl. 9.00-16.00.***
***Lærari: Thue Christiansen úr Grønlandi, listhandverksmaður. Kostnaður 1850,- íroknað tilfar, amboð, drekka x 2 o.a. Tilmeld. 316491 frá 14. aug.***

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18,00
***Tilhaldið fer í summarfrí og byrjar aftur í september. Lýst verður nærri.***
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv. Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Frá mánadegi 19. juni verður farið í summarfrí. Vit byrja aftur mánadagin 4. september. Gott summar.***
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá 15-18.

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*
***Týsdag***
Kort og onnur spøl.
***Mikudag***
Ítriv: silvurarbeiði og annað
***Hósdag***
Fimleikur
*Hvønn dag drekka við nýbakaðum.*

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 21. juli kunnu Lydia og Jógvan Sundstein halda gullbrúdleyp.

**Silvurbrúdleyp**
Fríggjadagin 21. juli kunnu hjúnini Katrin og Dánjal Samuelsen, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í høllini á Hálsi tann 22. juli fyri innbodnum.

Mánadagin 31. juli hava Henny og Óli Karl Olsen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00 sama dag. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 20. juli á tlf. 456719 ella 227322.

1. august hava Ann og Poul Jákup Mohr, Fuglafjørður, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík, leygardagin 5. august kl. 18.00. Tey, sum ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 22. juli á tlf. 444655.

**Brúdleyp**
Leygardagin 15. juli *giftust* Finnløgg Kjær og Petur Oluf Joensen í Vesturkirkjuni.

22. juli giftast í Havnar kirkju Beinta Bendix Sørensen, Tórshavn og Jan Mølvad Laursen, Esbjerg. Veitsla verður fyri innboðin í HB-húsinum.

Leygardagin 22. juli kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni Heidi Simonsen, Sandavágur og Jan Gardar, Klaksvík. Veitslan verður í Skálanum fyri innbodnum.

Leygardagin 22. juli kl. 16.00 giftast í Miðvágs kirkju Turid Marjun Gaardlykke, Miðvágur og Jóhannes Davidsen, Sandavágur. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00.

Leygardagin 22. juli kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni Davina á Lava Sundskarð, Klaksvík og Árni Skorðastein, Leirvík. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík.

Leygardagin 22. juli kl. 15.30 giftast í Gjáar kirkju Eyðvør Huusgaard á Fløtti, Argir og René Thomsen, Odense. Veitslan fyri innbodnum verður í Gjáargarði kl. 18.30.

Leygardagin 22. juli kl. 12.00 giftast í Listaskálanum, Elin Maria Jóannesardóttir Hansen, Runavík og Jóhan av Reyni, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum á Svangaskarði kl. 18.00.

Leygardagin 22. juli kl. 12.00 giftast í Grøndalslund kirkju, Tårnvej 350, Rødovre, Helena Gaard, Klaksvík og Leif Bjarning, Rødovre. Brúdleypasadr.: Strøbyholm 40, DK 2650, Hvidovre.

Leygardagin 22. juli kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju, Dorthe Pedersen og Súni Christiansen, bæði úr Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í samkomuhøllini í Føroya Studentaskúla í Hoydølum kl. 19.00.

Leygardagin 5. august kl. 13.00 giftast í Langevåg kirkju, Sølvi Viola Frederiksen, Langevåg (Ålesund) og Frói Jacobsen, Miðvágur. Veitslan verður fyri innbodnum.

Leygardagin 5. august kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Annika Helgadóttir Joensen, av Hvítanesi, og Kári Davidsen, úr Havn. Veitslan verður hildin í B36-húsinum fyri innbodnum.

Leygardagin 5. august kl. 14.00 giftast Maria Elina Kemppainen, Rovaniemi og Marni av Kák Nattestad, Miðvágur, í Jätka parkini í Rovaniemi, Finnland. Veitrsla fyri innbodnum verður í matstovuni Oppipoika. ***Leygardagin 19. august*** kl. 11.00 verður opið hús í Oasuni, Kirkjustræti 4 í Hoyvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 12. august kl. 14.00 giftast í býráðssalinum í Tórshavn, Guðrið Bogadóttir Vinther, Tórshavn og Magni Jøkladal Hansen, Fuglafjørður. Veitslan verður hildin í Argja Róðrarneysti kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 22. juli á tlf. 316698, 444617, 222248, 504132, ella á teldupostí hdesign@post.olivant.fo

Leygardagin 19. august kl. 14.00 giftast í Christianskirkjuni Katrin Sigurðsson, Klaksvík og Hans Pauli Sjóstein, Viðareiði. Veitslan verður á Hotel Norð kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin at siga frá á tlf. 457522, 451006 ella teldupost hkhpja@post.olivant.fo – usks@kallnet.fo áðrenn 1. august.

Leygardagin 19. august kl. 15.00 giftast í Leirvíkar kirkju Beinta Nón, Fuglafjørður og Terji Lervig, Leirvík. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Um tú vilt vera við til at gleða brúðarparið, kanst tú tekna teg við at ringja tlf. 223815, 775456 ella t-post brudleyp@gmail.com áðrenn 6. august.

Leygardagin 19. august kl. 14.00 giftast í Vesturkirkjuni Randi Fríðvør Poulsen, Tórshavn, og Sigurd Hentze, Skopun. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 20. juli á tlf. 322206 ella 222137.

**80 ár**
Fríggjadagin 21. juli verður Any Dimon, Tvøroyri, 80 ár. Móttøka verður í TB-húsinum frá kl. 11.00-15.00.

**85 ár**
Olga Thomsen, Nólsoy, ættað av garði í Kollafirði, verður 85 ár í dag, 19. juli. Dagurin verður hildin hósdagin 20. juli hjá soninum Magnus Thomsen, Leitisgøta 12, undir hamarinum á Argjum. Øll eru hjartaliga vælkomin. Tlf. nr. hjá Olgu er 322087.

**Prógv**
30. juni fekk Randi Olsen, Tórshavn, Bachelor prógv sum námsfrøðingur frá Gladsaxe seminar.